# Kringlan hevur alt

Í Reykjavík finnast tvær stórar sølumiðstøðir, hvør við størri úrvali enn hin. Fert tú í Kringluna, kemur tú ikki tómhentur útaftur.

Inni í Kringluni er eitt stórt tal av handlum – í roynd og veru so mangir sum 150, umframt matstovur og tænastur í tí 36.000 fermetrar stóra handilsbygninginum.

Her fært tú tann nýggjasta mótan og allar tær vørur ið hóska til eina slíka miðstøð – bæði smúkkur, tónleik, mat, bøkur, drykkivørur, filmar og so framvegis.

Allar vørurnar hava høga góðsku, og koma frá so ymiskum londum sum Fraklandi, Týsklandi, Onglandi, Hálandi, Norðurlondum, USA og Italien.

Tann størsti handilin í Kringluni er "Hagkaup", har ein fær alt tað sum einum tørvar í gerandisdegnum.

Umframt handilslívið, verður eisini gjørt nógv fyri at hugna um hjá teimum vitjandi. Tí verður við regluligum millumbilum skipað fyri ymiskum tiltøkum fyri at savna fólk saman.

**NÚTÍÐAR**



*Kringlan í Reykjavík stendur einki aftanfyri aðrar sølumiðstøðir í útheimi. 150 handlar eru í Kringluni*

## Ævintýra-land

**Ein partur av Kringluni er serliga ætlaður børnunum. Hetta fer fram í Ævintýralandi, her tey kunnu stuttleika sær, meðan foreldrini eru til handils.**
**Millum tað, sum børnini hava at velja millum, er eitt risastórt slott, bóltaland, fótbóltsspæl, kurvabóltahorn, klæðnahorn og eitt freistandi úrval av spennandi leikum.**
**Hetta Ævintýralandið er opið allar dagar, tá Kringlan er opin.**

*Breitt úrval av skundverum*
*– heitum og køldum*



*...eisini Soft-Ice*

skivan · LANDAVEGUR 77

*Opið allar dagar frá 07-23*